# LÓGLOYSI VALDA KAVARAØKINI

**VINNUKAVING** Arbeiðseftirlitið hevur skriva út certifikat í fleng, og 5-vikur skeið verða skrumlað ígjøgnum eftir fýra døgum. Og tað ringasta er, at menn halda seg hava eitt nýtiligt certifikat, men veruleikin er, at tað kann ikki nýtast uttan fyri Føroyar, sigur Ingi Sørensen, vinnukavari

Leo Poulsen

Tað hevur leingi verið stór ónøgd millum vinnukavarar við góðkendum vinnukavaraskjølum, tí frítíðarkavarar við lítlum og ongum prógvum ólógliga hava framt vinnukaving.

- Vit hava ofta gjørt bæði myndugleikar og viðkomandi stovnar vart við skilið, men vit mugu bara sanna, at vit tosa fyri deyvum oyrum, sigur Ingi Sørensen.

Seinastu páfundini hjá myndugleikunum hava fingið bikarið at flóta yvir hjá vinnukavarunum.

- Ein vinnukavaraútbúgving, sum veruliga er nakað verd, er ein 4 mánaðar grundskúli í eitt nú Noregi, ið gevur førleika til at arbeiða niður til 50 metrar við hydrauliskum, elektriskum og lufttrýstamboðum. Sløkkjuliðskavararnir hjá Tórshavnar Býráð fóru á eitt tvær vikur langt bjargingarkavaraskeið. Og brandmeistarin proklamerar í sjónvarpinum, at nú kunnu hansara menn arbeiða allastaðni kring um í heiminum, sigur Ingi Sørensen.

Haann sigur, at sannleikin er jú tann, at teir áðrenn 14 daga skeiðið skulu taka eitt fimm vikur langt skeið, ið gevur førleika til at fara á sjálvt bjarginarkavaraskeiðið.

- Men tað var ikki gjørt. Seinni fingu teir ein instruktør úr Danmark, at hava eitt fýra daga langt skeið, í staðin fyri fimm vikur, og so var sloppi. Nú hava teir fingið í posa og sekk. Bjargingarkavarar og vinnukavarar til 30 metrar skulu ikki gera sær tankar um at fáa arbeiði uttanlands. Tað er óhugsandi, sigur Ingi Sørensen.

Hann heldur ógvuliga lítið um, at eitt fýra dagar skeið verður stáplað upp á beinini, tí tað kann á ongan hátt metast javnt við tað fimm vikur skeiðið, sum kravt verður.

- Tað átti ikki at borið til at onkur Hanus ella Janus kemur upp til Føroya at halda eitt fýra daga skeið, og so hevur tú eina fullfíggjaða vinnukavaraútbúgving, sum í verðuleikanum er skræddarseyma til bjargingarskeiðið, og als ikki til vinnukaving yvirhøvur. Soleiðis fungerar tað ikki, sigur Ingi Sørensen.

## Á kompromi við trygdini

Ikki bert eru hesi skeið og certifikat ónýtilig til vinnukaving uttan fyri Føroyar, tey eru beinleiðis vandamikil. Tað er eingin møguleiki, at tú kanst læra tað sama eftir fýra døgum, sum tú ger gjøgnum fimm vikur.

- Og tað, sum størstur denturur var lagdur á í vinnukavaraskúlanum í Noregi, var trygdin. Hon er alfa og omega. Og ganga menn nú og halda, at teir vita alt, tí teir standa við einum prógvi í hondini, so kann tað fáa fatalar fylgjur, sigur Ingi Sørensen.

Hann sigur, at tað er strangt neyðugt at halda seg til reglurnar fyri kaving, og tað verður ikki gjørt, um menn kunnu umvæla ella viðlíkahalda upp til 10 aliringar um dagin.

- Tað eru greiðar reglur fyri, hvussu long tíð skal ganga millum tvær kavingar, og fleiri kav tú gert sama dag, longri tíð skal verða millum tær og styttri verða kavini. Mikroskopiskar luftboblur verða upptiknar í kroppin, og sjálvt um ein kavari ikki nýtist at merkja nakað í dag ella í morgin – ella um nøkur ár – so kann tað ein vakran dag gerast fatalt, at hesar reglurnar ikki vórðu fylgdar, tað finnast óteljandi dømi um hettar og tað er nakað ein fær inn við skei á altjóða góðkendum vinnukavaraskúlum sigur Ingi Sørensen.

## Lógloysi

Vinnukavarin sigur, at hvørki politikarar ella avvarandi góðkenningarmyndugleikar hava nakrar sum helst reglur og mannagongdir á økinum.

- Nú hevur ein frítíðarkavaraskúli í Klaksvík fingið loyvi til at undirvísa í vinnukaving, hóast talan er um ein frítíðarkavaraskúla. Tað er fullkomiliga óhoyrt og beinleiðis ábyrgdarleyst av myndugleikunum at loyva slíkum. Nú kunnu kavarar fáa eina sokallaða vinnuliga kavaraútbúgving fyri ein dýran penga, sum ikki er tað pappírið vert, ið certifikatið er skrivað á, sigur Ingi Sørensen.

Hann sigur, at tú við hesari undirvísing kann fáast eitt 30 metra arbeiðscertifikat, sum bert er viðurkent í Føroyum, í staðin fyri tey 12 metra certifikat, sum í nógv ár hava veri at fingið á Arbeiðseftirlitinum.

- Kavarar við einum vanligum 12 metra kavaraloyvi hava í áravís ólógliga serviserað aliringar. Tí sjálvt um tú hevur hetta 12 metra kavaraloyvi, eru aliringar

